GOYMSLULÆRLINGUR

søkist til goymslurnar á Tórshavnar Skipasmiðju

Arbeiðið er sera fjølbroytt og spennandi og fevnir um keyp, sølu, vøruavgreiðslu og goymslustýring.

Tann sum settur verður skal hava FHS ella HH prógv.

Lærutíðin er 3 ár um tú hevur FHS. 2 ár um tú hevur HH. Partur av lærutíðini fer fram uttanlanda.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og S & K.

Umsókn saman við avritum av prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til Tórshavnar Skipasmiðju, mrk.: Goymslulærlingur, Postboks 65, 110 Tórshavn. Starvið skal setast setast skjótast gjørligt. Allar umsóknir verða viðgjordar í trúnaði.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jens Mohr á telefon 31 11 55.

TÓRSHAVNAR SKIPASMIÐJA

info@faroeyard.fo

Tórshavnar Skipasmiðja er móðirfelag hjá samtakinum ið umfatar skipasmiðjurnar í Havn, á Skála, í Vestmanna og mekaniskan verkstað í Runavík. Á skipasmiðjuni í Havn arbeiða um 140 fólk. Á goymslunum og keyps-og søludeildini arbeiða 11 fólk. Goymslan umfatar um 25.000 ymsar vørueindir.

Lýsið í **sosialinum**

Fólk til IRF í Vágum

Søkt verður eftir tveimum fólkum til IRF í Vágum, at byrja skjótast gjørligt.

Arbeiðið umfatar:

I. Innsavnan av øllum burturkasti frá húsarhaldum, bingjuplássum, virkjum og handlum v.m.
II. Flutningur av burturkasti úr Vágum.
III. Rakstur og umsiting av tyrvingarplássinum í oynni.
IV. Umframt annað fyrifallandi arbeiði hjá IRF.

Krøv til umsøkjararnar:

I. Stóra koyrikortið, og vanir at koyra lastbil.
II. Skulu kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Galdandi sáttmáli:
Lønarsáttmáli fyri fastløntar millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 8.11.-1999.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til IRF tlf. 44 33 43 ella 21 28 43, Heðin Zachariasen.

IRF **Postboks 39**
520 Leirvík

Tórshavnar Musikkskúli

Hús ella íbúð

Tórshavnar Musikkskúli søkir hús ella íbúð til leigu í Havn ella nærhendis til ein av lærarum skúlans.

Tlf. 31 32 17

Landssjúkrahúsið

FO-100 Tórshavn

Á sjúkrahúsverki Føroya **á psykiatrisku deild á Landssjúkrahúsinum** er eitt avloysarastarv sum psykologur (40 tímar) leyst at søkja frá 1. januar 2000 til 1. august 2000.

Psykiatriska deild á Landssjúkrahúsinum er fyri alt landið og hevur 64 dognpláss/sengur við umleið 400 innleggingum árliga. Harumframt er dagdeild og amulant/økispsykiatriskt virksemi. Psykiatriska deild hevur eisini tilsýnstænastu á øðrum sjúkrahúsdeildum, umframt ávísar embætisskyldur úteftir, t.d. mentalobservatiónir o.a.

Á psykiatrisku deild eru í lotuni: 4 yvirlæknar, 2 psykologar, 1 sosialráðgevi, røktarstarvsfólk, leiðsluskrivari, læknaskrivarar o.o.

Arbeiðið hjá psykologinum er at gera diagnostiskar kanningar, psykoterapeutiska viðgerð, kreppuhjálp umframt supervisión og undirvísing av øðrum yrkisbólkum. Eisini skal psykologurin luttaka á viðgerðarfundum málsviðgerð á deildunum. Arbeiðið er sera sjálvstøðugt og krevur góðan samstarvsførleika.

Onnur førleikakrøv til umsøkjaran eru, at viðkomandi er cand.psych við autorisatión. Umsøkjarar við test- og supervisiónskunnleika verða tiknir fram um.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknarfreistin er **30. november 1999, kl. 14.00.**

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Sofus Joensen, leiðandi yvirlækna á psykiatrisku deild.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvi o.ø. skal sendast til **Almanna- og heilsumálastýrið, Starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn.**



SIMsalaBim..!

...nú kann tín nýggja GSM-fartelefon nýtast beinanvegin

Eingin bíðitíð
Nú er tað so lætt at fáa sær GSM-fartelefon sum ongantíð áður. Fyri bert 500,- kr. kann eitt GSM-hald stovnast, og sum nakað nýtt kunnu søluumboðini hjá Føroya Tele geva tær SIM-kortið*) beinanvegin.

Hetta ger, at tú nú kanst ringja, senda tekstboð og gera alt tað, sum GSM-telefonirnar kunnu, longu meðan tú ert á veg úr aftur handlinum.

*) SIM-kortið er sjálvur heilin í telefonum, ið rúmar sjálvt telefonnummar, teleforbók og mangt annað.

Bíligari mánaðargjald á NMT 900
Hevur tú eina NMT 900 fartelefon og umhugsar at fáa eina GSM-fartelefon, so er ikki at blaka NMT-fartelefonina burtur.

Við at varðveita NMT-haldið í húsinum, fer fasta mánaðargjaldið úr 89,- kr. niður í 25,- kr.

Bíligari samrøður við GSM
Og tað besta av øllum...
Frá 1. desember 1999 lækkar innanlands minuttgjaldið á GSM úr 3,30 kr./min. niður í 2,80 kr./min. um dagin og heilt niður í 1,40 kr./min. um kvøldið og náttina.

SIM-kort fáast á hesum støðum:
Telebúðirnar kring landið • Storno J.S. Radio • Elektronikbúðin í Tagi Radiobúðin í Runavík Contrive í Klaksvík Klaksvíkar Radiohandil

FØROYATELE
Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo
Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonvarðið

pétur & pétur • 320870